Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo

www.hafnia.fo

# TÆNARANÆMINGUR



**Hotel Hafnia sóknast eftir tænaranæmingi at byrja um ársskiftið.**

**Tú ert...**
- Tænastuhuga/ur
- Fyrikomandi
- Álítandi
- Samstarvsfús/ur
- Áhuga/ur fyri at læra

**Tú lærir...**
- At veita tænastu á altjóða støði
- Kunnleika um mat & vín
- Roknskap
- Teldukunnleika

**Tú fært...**
- Lærupláss á eini av Føroya bestu matstovum
- Ein áhugaverdan og avbjóðandi arbeiðsdag
- Góðar arbeiðsumstøður
- Skiftistíð

Lærutíðin er 3 ár og 4 mánaðir – tað er ein fyrimunur um tú hevur »jord til bord« skúlagongd á 20 vikur.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Peter Hentze.

Umsókn, við avriti av prógvum og ummælum, skal sendast til:

*Hotel Hafnia*
*Áarvegur 4 - 10*
*FO-100 Tórshavn*
*hafnia@hafnia.fo*

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 1. oktober 2005

**HOTEL HAFNIA** er eitt altjóða 4-stjørna hotell, við 57 kømurum, 5 fundar- og veitsluhølum, matstovu og lounge.

Hotellið er væl vitjað av handils- og ferðafólki úr øllum heiminum, og hetta er við til at seta dám á livandi umhvørvið.

Vit eru 45 fólk, ið dagliga starvast við at veita Føroya bestu tænastu til gestir okkara.



*Hotellið í miðbýnum* ★★★★

HOTEL HAFNIA

Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Á gjaldstovuni arbeiða uml. 30 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er standardroknskaparskipanin Oracle Financials. Av øðrum skipanum undir Búskaparskipan landsins kunnu verða nevndar
- Felags lønarskipanin, sum verður karmur um útgjaldingar av øllum almennum lønum
- Búskettskipanin, sum er karmur um fíggjarlógararbeiðið hjá landinum
- Dátuvøru-húsið, sum nú er sett upp, og sum skal verða grundarlag undir eini størri framleiðslu av leiðslukunning.

Meira um hetta er at lesa á heimasíðuni hjá gjaldstovuni.

Í løtuni nýta okkurt um 600 brúkarar Búskaparskipan landsins.

Landið hevur tikið í nýtslu eina munadygga fíggjarstýringarskipan, og er grundarlag nú skapt fyri eini meira miðvísari stýring móti eini munadyggari fyrisiting. Talan er um at seta í verk mál- og avriksstýring fyri tað almenna.

Við mál og avriksstýring skulu stjórnarráð saman við stovnum seta yvirskipað mál fyri tær uppgávur, sum stovnur er settur at loysa.

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**

# Búskaparfrøðingur á gjaldstovuni



**Starv sum búskaparfrøðingur á gjaldstovuni er leyst at søkja**

Talan er um eitt spennandi starv í einum arbeiðsumhvørvi við nútímans amboðum og skipanum og eitt starv, sum er mennandi bæði fakliga og persónliga.

Starvið fevnir m.a. um arbeiði við at dagføra roknskaparkunngerð og rundskriv og gera roknskaparleiðbeiningar á ymsum økjum. Arbeitt verður við at seta í verk mál og avriksstýring fyri tað almenna. Tú skalt gera leiðbeiningar á hesum øki og vera við til ráðgeva stovnum, hvussu mál og avriksstýring verður sett í verk. Ein ráðgevingarbólkur fer at samskipa verksetingina av mál- og avriksstýring. Tú verður tann, sum kemur at samskipa leiklutin hjá gjaldstovuni í hesum arbeiði.

Tú skalt hava eina hægri útbúgving innan roknskaparøkið. Um tú hevur arbeitt við Balanced scorecard e.t., so er hetta ein góð barlast.

Tú skalt vera opin, duga at samstarva og kunna geva íblástur til skilagóðar loysnir.

Starvið verður lønt sum fulltrúi sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

Umsóknir skulu verða Føroya Gjaldstovu, boks 2009, 165 Argir, í hendi innan 15. september 2005.

Tú kanst byrja í starvinum beinanvegin.

Leif Abrahamsen á telefon 352400 er fúsur at svara spurningum starvinum viðvíkjandi.

# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara 9. juli 2005 so minniligan. Takk fyri alla hjálp, sang, gávur, fjarrit, blómur og heilsanir.*
***Vinarliga Arina og Høgni***



*Hjartaliga takka vit øllum, sum mintust okkum á okkara hjúnabands- og dópsdegi 6. aug. 2005.*
***Vinarliga Malla, Søren og Emil***



*Hjartaliga takka vit øllum teimum, sum við gávum, telegrammun, blómum og ikki minst teimum, sum vóru við at gera silvurbrúdleypsdagin 9. juli 2005 so hugnaligan. Eisini eina stóra tøkk til øll, sum hjálptu til.*
***Joan og Tage Jørgensen***